## Til Íslands eftir arbeiðsmegi

Grønlendska landsstýrið ætlar sær at gera sær dælt av, at heilsuverkið í Íslandi skal spara millum seke og sjey prosent næsta ár. Sparingin hevur ætlandi við sær, at fólk, sum arbeiða sambært avtalu við heilsuverkið, missa arbeiðið, og teimum ætla grønlendingar sær at fáa fatur á, sigur KNR. Tí fara grønlendsku heilsumyndugleikarnir at skipa fyri einum tiltaki í Íslandi fyri at kunna um arbeiðsmøguleikarnar í Grønlandi. Men kappingin um tey íslendsku heilsustarvsfólkini er hørð, tí bæði norðmenn og sviar vilja fegnir hava fatur á teimum, sigur KNR.



## Trolaramenn fáa endurgjald

Bretskir trolaramenn, sum vóru uppi í troskastríðnum við íslendingar í sjeytiárunum, fáa nú endurgjald frá bretsku stjórnina fyri tann inntøkumiss, ið stóðst av íslendsku fiskimarksútflytingini. Peter Mendelson, handilsmálaráðharri, hevur júst hitt trolaramenn úr Hull, Grimsby, Fleetwood og Aberdeen, har hann handaði teimum fyrstu endurgjald. BBC veit at siga, at umleið 1.000 fyrrverandi trolaramenn fáa endurgjald fyri inntøkumiss, men sambært blaðnum Grimsby telegrapg hava umleið 2.500 fyrrverandi trolaramenn søkt um at fáa endurgjald.

**Ein samantvinning av føroyskum og útlendskum serfrøðingum skal tekna størsta einstaka byggiverk í Føroya søgu. Team Fuglark skal nevniliga tekna nýggja skúladepilin**




*Her er eitt av donsku umboðunum fyri Team Fuglark, sum greiðir frá, at tað er týdningarmikið, at bygningurin fellir inn í landslagið*

# Team Fuglark fekk Marknagil

SKÚLABYGGING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í morgun varð avdúkað, hvør skal tekna skúladepilin við Marknagil. At byrja við vóru 25 feløg boðin at koma við sínum boði. Síðan varð skorið niður á fimm og at enda vóru tvey feløg, sum sluppu at koma við einum endaligum boði.

Tá tað kom til stykkis valdi dómsnevndin, sum er mannað av teimum, ið fara at nýta skúlan, umframt serfrøði, fram til, at tað skal vera Team Fuglark, sum skal tekna skúladepilin.

– Toymið hevur í allari tilgongdini sýnt ein megna vilja og eitt vælorðað arbeiði við uppskotinum og sniðgevingini av hugskotinum, sigur dómsnevndin í síni grundgeving.

Hon leggur afturat, at uppskotið á ein sannførandi hátt livir upp til støðið, sum var sett fyri uppgávuna.

### Team Fuglark

Samtakið, sum skal tekna skúlan er mannað av Fuglark, Bjarke Ingels Group ApS, Lemming & Eriksson, Sámal Johannesen, Martin E. Leo Sp/f og Kj Elráð.

Hetta er altso eitt samtak, sum er mannað av føroyingum og dønum, sum hava fingið til uppgávu at projektera skúlan við Marknagil.

Eftir ætlan skal sjálv projekteringin kosta ímillum 30 og 40 milliónir krónur og vera liðug í fyrru helvt komandi ár.

### Næstan endaligt

Í morgun varð eitt uppskot víst fram, og dentur verður lagdur á, at uppskotið, sum varð lagt fram í morgun ikki er langt frá endaliga úrslitinum, sum skal vera klárt til skúlabyrjan í 2014, tá ætlandi 391 milliónir krónur eru nýttar til skúladepilin.

Hinvegin er eisini latið upp fyri, at hesin glasbygningurin við flagtaki kann broytast eitt vet, um onkrar fyritreytir broytast.

### Grønur skúli

Umframt at vera eitt stórt byggiverk, so verður eisini lagt upp til, at skúlin skal hava eitt lítið útlát. Til upphiting liggur nevniliga í kortunum, at nýta jarðarhita, sum skal vinna seg sjálvan innaftur eftir fimm til tíggju ár. Tað vil altso siga, at tað upprunaliga ger skúlan eitt sindur meiri kostnaðarmiklan, men tað skal vera ein sparing í longdini.



*Leiðslurnar á ymisku skúlunum, sum skulu nýta bygningin vóru við í serfrøðingabólkinum, sum valdi Team Fuglark*



*Tíðindafólkini stóðu á rað, tá Helena Dam á Neystabø, staðfesti, at Team Fuglark skal tekna bygningin*